# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

*15. februar fekk Dann Hjalti eina diddu. Hon vigaði 3350 gr og var 50 cm long. Hon eitur Magda eftir fastur síni, sum ikki er ímillum okkum longur.*



4. mars fingu Lisa Lassen Jørgensen og Trygvi Restorff í Brekkunum, búsitandi í Silkeborg, ein son.

7.mars fingu Anita Hoydal og Jacob Snedker Jensen Ålborg eina dóttir vigaði 3580 g var 53 cm

12. mars fingu Aimi og Helgi Justinussen ein son, ið vigaði 3050 gr. og var 51 cm langur.

12. mars fingu Karin Simonsen og Djóni Højgaard, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3250 gr.

20. mars fingu Miriam Borg, Vágur, og Remus Adi, Rumenia, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3800 gr.

20. mars fingu Kirstin Grønagarð og Hjalgrím Joensen, Toftir, eina dóttur. Hon var 33 cm long og vigaði 950 gr.

22. mars fingu Kristina og Páll á Reynatúgvu, Sandi, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4750 gr.

22. mars fingu Sóleyð P. Hansen, Kollafirði, og Regin Kristensen, Argjum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3665 gr.

22. mars fingu Maud og Zacharias Johansen, Argjum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4100 gr.

22. mars fingu Augusta og David og Mattias stóribeiggi, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4250 gr.

22. mars fingu Sólvá og Sam Vang, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3650 gr.

23. mars fingu Eyðgerð á Grønastøð og Birgir Durhuus, Frederiksberg, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2900 gr.

23. mars fingu Angelie Mouritsen og Jan Yttesen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 4200 gr.

23. mars fingu Susan Brockie og Bárður Lava Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4450 gr.

25. mars fingu Marita Tausen og Erland Joensen, Norðdepli, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3100 gr.

26. mars fingu Annelisa S. og Jón Magnus Joensen, Argjum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3350 gr.

26. mars fingu Sigrun og Petur Eli Niclassen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4300 gr.

26. mars fingu Annika og Allan Hjaltalin, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4000 gr.

27. mars fingu Beinta og Petur Nielsen, Froðba, ein son. hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

28. mars fingu Lív og Mannbjørn Nesá, Nesi, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4050 gr.

29. mars fingu Annelin Káradóttir og Johannus Juhl Johannesen, Skála, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3350 gr.

30. mars fingu Mariann Rasmussen, Tórshavn, og Jón Ljósá Rasmussen, Strondum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4050 gr.

31. mars fingu Elin Mørkøre og Jens Chr. Krüth, Tórshavn, ein son. Hann var 63 cm langur og vigaði 5160 gr.

31. mars fingu Ingerð Andreasen og Rúni Ellinsgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3950 gr.

## Til minnis um beiggja mín
# Sverra Larsen



Ringt er at seta orð á kenslurnar, nú eitt ár er farið, síðan beiggi mín andaðist. Kortini vil eg fegin skriva nakrar fáar reglur og takka honum fyri alt tað, ið hann var fyri meg og míni: døturnar og teirra familjur, ikki minst ommubørnini hjá mær stóðu hjarta hansara sera nær.

Sverri var lítillátin av lyndi og gjørdi ikki nógvan háva burtur úr sær sjálvum. Á sín stillføra hátt vísti hann altíð umsorgan fyri okkum. Hann var sera beinasamur og himpraðist ikki við at taka eina hond í, um á stóð.

Líka frá barnsbeini stóð hugurin hjá Sverra til sjógvin. Sloppin úr skúlanum, var hann skjótur oman í fjøruna, á seiðaberg ella í onkran bát. Hesin alskurin til sjógvin fylgdi honum gjøgnum alt lívið. Aftan á lokna útbúgving sum skipsførari sigldi hann úti sum stýrimaður í eini 25 ár. Tá ið hann var heima í feriu, var hann skjótur at fara til útróður, fyrst við pápanum, seinni fekk hann sær bát sjálvur. Hugurin til sjógvin og hegnið til at fáa fisk tóktist at ganga hond í hond.

Sverri var raskur og sterkur likamliga. Hann var íðin at røkja sjógvin, og hugurin at fiska var tað, ið altíð lá fremst í huga. Seinnu árini fór heilsan tó at bila. Sverri fekk ringa sjúku at dragast við, ið at enda vann á honum.

Við hesum vilja vit siga Sverra farvæl. Hvíl í friði, góði beiggi.

**Systir tín Hilda**

## Bergtóra Thomsen deyð

Mikudagin 23. mars 2005 andaðist Bergtóra Thomsen í Havn 74 ára gomul.

Bergtóra var ættað úr Nólsoy, elsta dóttir Fridtjof og Annu Catrine Sofie (Tinu) Jacobsen.

Tey vóru 10 systkin. Bjarni var elstur, hann búði í Nólsoy og andaðist í fjør. Bergtóra var næstelst. Síðani kom Signhild, sum býr í Havn. Sverri búði í Nólsoy og í Havn, hann andaðist fyri nøkrum árum síðani. Torleif gekk burtur við Stellu Argus. Lisa býr í Danmark. Kirstin býr við Gøtugjógv. Esmar býr í Havn. Eiler, sum búði í Nólsoy, gekk burtur í Nólsoyarfirði. Yngstur er Sørin, og hann býr í Nólsoy.

Tá Bergtóra var konfirmerað, fór hon til Havnar at arbeiða. Har hitti hon Eigil, og tey giftust í 1948. Eigil doyði í 1974, bert 46 ára gamal. Tey fingu synirnar Lars og Petur, sum báðir búgva í Norðurjyllandi, og døturnar Annu Mariu, sum býr í Havn, og Kristinu, sum býr í Hósvík. Ommubørnini eru 13 og langommubørnini 14.



Bergtóra var arbeiðssom. Hon hevur havt fleiri arbeiði, mest við at gjørt reint. Í fleiri ár arbeiddi hon í Mjørkadali. Tey síðstu árini, áðrenn hon gavst vegna aldur, gjørdi hon reint á Landssjúkrahúsinum.